## Sær betri út við laksi

Møguleikarnir hjá norðmonnum at reka lønandi góðsking av laksi vórðu við endanum av 2008 dømdar “niður og norður” av fólki innan ES. Men hetta vilja norðmenn ikki lata á sær sita. Seinastu trý árini er góðsking av laksi tann parturin av norsku matvøru-framleiðsluni av fiskamati, sum er vaksin mest. Kurvurnar peika uppeftir, tó at rakstrarmarginalurin ikki vóru størri enn 2,5%, sum tað verður rópt. Tað er Nofima, sum vísir á tøl í hesum sambandi. – Góðsking av laksavørum er millum tær framleiðslur, sum hava havt størst lønsemi í seinastuni. Sum skilst, virkar hesin parturin av vinnuni væl, bæði tá tað eru laksaalarar, sum reka góðskingar-virki og onnur feløg, sum ikki hava aling, men bara reka góðskingarvirki, sum byggja á vørur úr laksi.



# Fáar landingar - lágir fiskaprísir



*Tað er ikki nógv landingarvirksemi í Klaksvík um dagarnar, men mánadagin koma trý línuskip inn at landa*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Í gjár landaðu tveir trolbátar og ein snellubátur í Klaksvík, og mánadagin koma trý línuskip inn at landa**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Trolbátarnir, Varðin og Fiskaklettur, landaðu í Klaksvík í gjár. Varðin, sum hevur roynt á Skeiva-banka, hevði eini 20.000 pund og Fiskaklettur, sum hevur roynt norðanfyri, hevði stívliga 8.000 pund.

Snelluskipið Báran landaði eisini í Klaksvík í gjár. Teir høvdu roynt í einar 2-3 dagar og høvdu 17.000 pund av upsa.

Um middagsleitið í dag kemur garnaskipið Ágot eisini inn at landa, og teir hava eini 18.000 pund av svartkalva.

### Línuskip mánadagin

Á Landingarmiðstøðini í Klaksvík vita tey at siga, at trý línuskip hava boðað frá landing mánadagin. Tey eru Jákup B, Kvik og Helena, sum hava verið úti í eina góða viku ella so.

Sum skilst, roynist fiski-skapurin hjá línuskipunum yvirhøvur smáligur. Tey liggja um eini 6.000-7.000 pund um dagin, og sagt verður, at størri helmingurin av veiðini er toskur.

Leggjast kann aftrat, at tveir størri útróðrarbátar landaðu í Klaksvík í gjár.

Fagraenni hevði 6.000 pund, og Bragd hevði 14.000 pund á tveimum setum.

Úr Klaksvík frættist, at útróðrarbátarnir, bæði teir størru og teir smærru, javnan liggja um eini 100 pund á línuna.

### Vánaligur prísur

Fiskaprísirnir hava ikki verið nakað serligir í seinastuni.

Á Landingarmiðstøðini í Klaksvík siga tey, at toskur 1 og 2 er farin fyri einar 19 krónur fyri kilo, meðan toskur 3 er farin fyri millum 11 og 14 krónur fyri kilo.

Fyri hýsuna fáa bátarnir einar 10 krónur í miðal.

- Tann besta hýsan liggur um einar 12 krónur fyri kilo, meðan hýsan, sum er smærri, fer fyri minni prís, siga tey í Klaksvík.

# Góður sjómans-skapur umborð á Grími Kamban

**- Eg havi lisið samrøðuna, sum Sosialurin hevði við skiparan á Grími Kamban og havi heft meg við, at óvanliga stigið, sum manningin tók at lata sjógv niður í maskinrúm og last, er dømi um góðan sjómansskap í teirri støðu, sum manningin var í, sigur stjórin á Skipaeftirlitinum, Vilhjálmur Gregoriussen**

VANDAFERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var seinasta fríggjadag, at manningin umborð á ísfiskatrolaranum Grími Kamban kom illa fyri, meðan teir vóru til fiskiskap einar 50 fjórðingar eystur úr Fugloynni.

Skipið misti streymin, og skiparin noyddist at biðja Vaktar-og Bjargingartæn-astuna um sleip.

Tá Tjaldrið nakrar tímar seinni kom á leiðina, hevði manningin umborð á Grími Kamban eisini trupulleikar við sjógvi, sum gekk inn á verksmiðjuna.

Teir royndu at pumpa, men kláraðu sum frá leið ikki at halda dekkið lens, tí diesel-drivnað brandpump-an umborð á Grími Kamban gekk heit. Teir fingu pumpu frá Tjaldrinum, men sum kvøldið og náttin liðu, gekk illa at halda lens á verksmiðjuni, samstundis sum veðrið versnaði.

Pumpan typtist av spønum, sum stóðust av, at træskott brotnaðu, tá fiskakør fóru at rósa.

Endin var, at manningin tók ta óvanliga stig at lata sjógv renna niður í lastina og maskinrúmið á skipinum fyri at halda stabilitetinum so nøkulunda upp á pláss.

### Sjómansskapur

Stjórin á Skipaeftirlitinum, Vilhjálmur Gregoriussen, sigur, at hann hevur lisið samrøðuna, sum Sosialurin hevði við skiparan á Grími Kamban, Benadikt Olsen.

- Eg haldi, at stigið hjá manningini at lata sjógv sleppa niður í last og maskinrúm er dømi um góðan sjómansskap í teirri søðu, manningin var í hetta kvøldið og hesa náttina.

Hann vísir á, at Grímur Kamban eins og onnur skip í føroyska fiskiskipaflot-anum eru undir neyvum reglum um sýn, eftirlit og klassing.

- Vit hava heimild til at lata ein part av okkara eftir-liti til klassan – í hesum før-inum Norsk Veritas – at umsita. Hetta eftirlit fevnir í fyrsta lagi um skipsskrokkin og tað mekaniska umborð á skipinum. Grímur Kamban liggur soleiðis undir klassa-num, og tí kenni eg ikki ítøkiliga viðurskiftini mill-um klassan og skipið.

Stjórin vísir á, at tað tó altíð er soleiðis, at arbeiðs-umhvørvið umborð á skip-um liggur undir Skipaeftir-litinum.

- Grímur Kamban er ikki nakað gamalt skip, smíðað í 1987, og eg havi onga orsøk til at halda, at skipið ikki var í forsvarligum standi.



*Benadikt Olsen var skipari á Grími Kamban hendan minniliga túrin. – Góður sjómansskapur, sigur Skipaeftirlitið*

*Mynd: Jákup Durhuus*